# Tit gera eina framløgu um eitt av hesum evnunum í Pit Stop 7!

Evnini eru:

**1: Animals Hit the Headlines**

**2: Footprints of the English**

**3: Whodunit?**

**4: New Year**

**<u>Dømi</u>** um evni kunnu vera:

1. **evni:** Delfindráp í Føroyum

   Hávaálop, sum hava deyðan við sær

   Hundur, sum bjargaði manna frá tí vissa deyða

2. **evni:** Okkurt um hjálond hjá Stóra Bretlandi í Afrika

   Okkurt um enska málið

   Hvørji "hjálond" hevur Stóra Bretland í dag?

3. **evni:** Onkur sonn hending, har onkur er dripin

   Ein hópsdrápsmaður

   Onkur, sum hevur framt eina brotsgerð, men ongantíð er funnin

4. **evni:** Greið frá, hvussu nýggjár verður hildið, har tú býrt

Greið frá, hvussu nýggjár verður hildið í einum ávísum landi

Greið frá, hvussu tú heldur eitt gott nýggjár eigur at verða hildið

Royndin verður skipað soleiðis, at tit koma inn og greiða frá tykkara framløgu. EINKI Powerpoint! EINKI handrit. Kunnu hava stikkorð, men IKKI lesa upp. Framløgan skal vara MINST 3 minuttir. Dømini omanfyri eru bert dømi. Kunnu saktans velja okkurt heilt annað, **men** tað skal vera innan fyri evnini! Tá ið tit eru liðug at leggja fram, so velja tit ein lepa av borðinum. Tit verða biðin um at lesa nakrar reglur upp. Ein av kendu tekstunum, sum tit hava lisið uppá heima, stendur á har. Tit greiða frá, hvat hann snýr seg um. EINGIN fyrireiking!

## **<u>Mannagongd</u>**

1: Koma inn – siga góðan morgun

2: Finna tað fram, sum tit skulu brúka

3: Tit byrja framløguna

4: Kanska onkur spurningur kemur her

5: Tit velja ein lepa

6: Tit lesa eitt brot upp, sum lærarin vísir á

7: Tit greiða frá, hvat teksturin snýr seg um

8: Kanska onkur spurningur

9: Tit fara út - lærari og próvdómari avgera próvtal

10: Tit koma inn og fáa talið

Tit eru inni í uml. 10 min :-)